

# LEIÐARI BØRN OG UNG



Talan er um eitt nýtt og sera avbjóðandi og spennandi starv á einum øki, sum í løtuni er undir umskipan. Leiðarin verður settur við tilvísing til stjóran á Almannastovuni og verður partur av einum fakliga samansettum og sera spennandi leiðslutoymi.

Leiðarin kemur at hava fakligu og fíggjarligu ábyrgdina av samlaða virkseminum hjá Almannastovuni viðvíkjandi børnum og ungum við serligum tørvi, ið hevur eina fíggjarætlan á tilsamans knappar 40 mió. kr. og umleið 170 fólk í starvi.

Tað verður uppgáva leiðarans at standa fyri verandi virksemi og leiða tilgongdina at byggja upp, umskipa og menna tilboðini til børn og ung og teirra familjur. Hetta í tøttum samstarvi við stjóran á Almannastovuni og stovns- og deildarleiðarar innan økið. Økið skal skipast soleiðis, at tilboðini alla tíðina verða tillagað skiftandi tørvin hjá børnum og ungum.

Økið Børn og Ung fevnir um allar fyriskipanir og tilboð á almannaøkinum til børn og ung, sum landið hevur ábyrgd av. Fyriskipanirnar fevna um børn og ung, ið hava serligan tørv á stuðli. Talan er um børn og ung við likamligum, sálarligum, kensluligum og sosialum forðingum og trupulleikum.

Børn og Ung fevnir m.a. um:

- bústovnar fyri børn og ung,
- stuðulsfólkaskipan fyri brekað og varandi sjúk børn,
- ráðgeving, vegleiðing og viðgerð til familjur við børnum í skipanini,
- sálarfrøðilig kanning og eygleiðing av børnum,
- tilboð um familjuviðgerð sum samdøgurs-fyriskipan,
- tilboð til barnaverndartænastur um sálar-frøðiliga kanning og eygleiðing í sambandi við meting av foreldraførleika,
- supervisjón til starvsfólk,
- viðvirka í útgreining av børnum í samstarvi við heilsu- og skúlaverk,
- felags fyrisiting.

Vit sóknast eftir einum leiðara, sum er virkis-fúsur og kann vísa áræði og myndugleika. Ein leiðara, sum hevur fyrisitingarligar royndir og leiðsluroyndir. Fakliga er ynskiligt, at leiðarin hevur viðkomandi hægri útbúgving, eitt nú innanfyri heilsu-, sálar- ella námsfrøði.

Leiðarin kemur at arbeiða í hølum, har so stórur partur sum møguligt av Børn og ung-økinum verður savnað, herundir fyrisit-ingin og kanningar-, ráðgeva- og viðgerða-uppgávur v.m.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og yrkisfelag, sum Fíggjarmálaráðið hevur sáttmála við um fyrisitingarlig størv.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tel. 21 54 80, ella 34 64 21.

Skrivlig umsókn saman við próvskjølum, CV o.ø. skal vera Almannastovuni í hendi 23. mars 2009 kl. 12.00. Brævbjálvin skal hava frámerkið: "Leiðari Børn og Ung". Sendið umsókn til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

# Nú er ongin bíðitíð
## – hoyritól frá 0 kr.

HOYRNIN



## Vit eru øll ymisk
### – eisini tá tað ræður um hoyrnina

Hesi seinastu árini eru risaframstig hend viðvíkjandi tøkni í sambandi við hoyritól. Hoyritól verða nú gjørd í nógvum ymiskum sniðum, litum, prísklassum og av ymiskum veitarum.

Nú á døgum verða gjørd tól, sum sita aftan fyri oyrað, og eisini smá, næstan ósjónlig tól, sum sita inni í oyragongini.

Hoyritólini, sum nú verða nýtt, eru øll talgild, og kortini eru tey sera ymisk, líka frá sera einføldum tólum til tey meira framkomnu tólini.

Vit geva okkum góða tíð til í samráð við brúkaran at velja tað hoyritólið, sum hóskar best til tørvin, ynskini, vónirnar og ikki minst fíggjarstøðuna hjá tí einstaka.

## Vit hava...

- Onga bíðitíð
- Yrkislærdar hoyrndarserfrøðingar
- 4 ára garanti á hoyritól
- Ókeypis hoyriroynd
- Hoyritól frá 0 kr í sjálvgjaldi
- Ókeypis tænasta í eitt ár
- Hjálp til umsókn um stuðul frá tí almenna

J. C. Svabosgøta 12
FO-100 Tórshavn
Tlf: 32 17 31

Fax: 32 17 34
hoyrnin@kallnet.fo
www.hoyrnin.fo

